


**Nr. 7** *31. mars 2024* **84. árg.**

# Ein ov stórur syndari?

*Benny Hinn*

Av og á hendir tað, at fólk siga við meg, at tey eru ov stórir syndarar, og tí er eingin vón fyri teimum. Men latið okkum hyggja at tí, sum Skriftin sigur.

Í 1. Tim. 1,15 stendur: „Tað orðið er satt og til fulnar tess vert, at tikið verður við tí, at Kristus Jesus kom í heimin at frelsa syndarar, og teirra millum eri eg fremstur.“ Tað var Jesu uppgáva, tá ið hann kom her til jarðar, at frelsa syndarar, og tá ið Paulus, størsti trúboðarin nakrantíð, kundi siga, at hann var tann fremsti millum syndarar, so sært tú, at vón er so sanniliga fyri tær. Í ensku Bíbliuni, King James, stendur: „.. of whom I am chief.“ Hann var sjefurin yvir øllum syndarum, segði Paulus.

Í Luk. 19,10 staðfestir Jesus sína uppgávu: „Tí at menniskjusonurin er komin at leita upp hitt farna og at bjarga tí.“

Guds eyma faðireygað sá, hvussu illa støðd vit vóru av syndini. „Gud sýnir kærleika sín til okkara av tí, at Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar.“ Róm. 5,8. Her er ikki talan um, at vit fyrst mugu royna at betra okkum. Nei, tað eru vit ikki ment í egnari kraft. Jesus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar.

„Komið, latum okkum fara fyri rættin, sigur Harrin. Um syndir tykkara eru sum skarlak, kunnu tær verða hvítar sum mjøll („sum snjó“ stendur í King James); um tær eru reyðar sum purpur, kunnu tær verða hvítar sum ull.“ Jes. 1,18. Tú sært, at hvussu dálkaður tú ert, so reinsar Jesu blóð teg hvítari enn snjó. Gud sigur: „Sum royk eg striki út tíni misbrot og sum skýggj tínar syndir; vend við til mín, tí at eg eri loysnari tín.“ Jes. 44,22.

Gud flokkar ikki syndirnar í størri og smærri syndir. Nei, um vit geva okkum yvir til hansara og bjóða honum inn í hjartað og biðja hann fyrigeva okkum allar syndir okkara, so ger hann tað. Hann ger okkum til nýggjar skapningar, sum eru hvítari enn snjó.

*Effie Campbell* umsetti.

# Kristindómur og politikkur

*Aril Edvardsen*

Summi siga: „Blanda ikki kristindóm og politikk saman, tí tað er ein vandamikil blanding.“ Hvør, ið hevur funnið upp á handa pástandin, veit eg ikki; men viðkomandi hevur ið hvussu er ikki lisið Bíbliuna, tí hon boðar beint hitt øvugta.

Líka frá Mósebókunum og allan vegin út eftir lesa vit, at kongar og oddamenn fólksins hildu fram Guds orð og vilja hansara fyri fólkinum. Hesi bæði størv teirra vóru líka sum eitt og hitt sama. Tak t.d. Móses, Jósva, Ezra, Ester og Dánjal, og tá ið vit koma út í Nýggja Testamenti lesa vit um, hvussu Paulus og teir strandaðu á Malta, og hægsti maður á oynni, Publius, tók ímóti teimum og vísti teimum gestablídni. Faðir Publiusar lá sjúkur við fepuri og blóðgangi; men Paulus fór inn til hansara og helt bøn og legði hendurnar á hann og grøddi hann. Síðani komu eisini hini á oynni, sum vóru sjúk, til hansara og vórðu grødd.

Latið okkum byggja á klettin, orðið sum er Kristus. Tá verða húsini standandi, tá ið ódnirnar bresta á.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein oyðimørk

*Moses Hansen*

Í dag var eg á sjúkrahúsinum og vitjaði eina konu. Hon segði: „Andaliga mett, er tað sum ein oyðimørk her! Dugnaligir sjúkrarøktarfrøðingar og læknar taka sær av okkara likami. Men eingin gevur ella bjóðar okkum andaliga føði.“

Tað er, sum okkara ættarlið hevur gjørt menniskjað til ein kropp, ein kropp, sum skal vera so vakur og væl trenaður sum gjørligt, ein kropp, sum kann umvælast líka til tað síðsta. Men eingin hugsar um, at í tí kroppinum býr ein andi og ein sál, sum hava minst líka so nógv brúk fyri umsorgan og røkt sum kroppurin.

Um ljós endiliga verður varpað á andan og sálina, verður tað til alt annað enn Jesus og Orðið, sum stendur fólki í boði. Ja, ein kristin sjúkrarøktarfrøðingur kann seta sítt starv í váða, um hon opinskárað bjóðar sær at lesa úr Guds orði og biðja fyri einum sjúklingi.

Jú meir eg upplivi av hasum slagnum, jú meir eri eg sannførdur um, at eg vil vera ein vatnberi, ein, sum ber evangeliið, tað livandi vatnið, til menniskju í oyðimørkini.

*Effie Campbell* umsetti.

# Veitslan, sum varð gloymd

Vit høvdu rúmlig hús og leigaðu tí stundum út. Einaferð vóru tað fýra, sum búðu til leigu hjá okkum.

Um ta tíðina skuldi ein stór veitsla vera, nakað haðani vit búðu. Hetta frættu okkara fýra leigarar, og av tí at teir ongan bil høvdu sjálvir, vendu teir sær til mann mín at fáa hann at koma við teimum til veitsluna.

Nú visti eg, hvat fyri „veitsla“ hetta var, av sonnum ein verðslig veitsla – við bæði einum og øðrum tilboði. Og eftir sum maður mín fyrr hevði verið eitt „offur“ fyri sovorðnum, gjørdist eg ómetaliga sorgarbundin, tá ið eg hoyrdi, at hann lovaði at koma við og koyra teir, um bara veðrið bleiv gott.

Eg fór inn í kamarið og legði søkina fram fyri mín himmalska Faðir. Eg bað Gud um at bróta sundur snaruna, sum var sett upp fyri mann mín, og forða honum í at vera við hetta ódámliga kvøldið.

At enda fekk eg eina undurfulla vissu um, at Harrin fór at taka sær av øllum, og at eg rólig og trygg skuldi lata søkina upp í hond hansara.

So kom dagurin, og kvøldið ... Veðrið var av tí fagrasta, og allar treytir fyri túrinum vóru til steðar. Men einki varð nevnt um veitsluna. Ikki eitt orð! Og kvøldið gekk sum vanligt – bæði fyri okkum og leigarar okkara.

Ikki fyrr enn dagin eftir kom veitslan upp á tal. Tá gjørdust teir greiðir yvir, at veitslan longu hevði verið! Teir blivu heilt bilsnir og næstan skelkaðir...

Men tá var tað altso ov seint. Teir kundu bara staðfesta, at minnið upp á ein ella annan løgnan máta hevði svikið teir. **Tí allir fimm høvdu gloymt tað!**

Men eg prísaði mínum Harra og Gudi, honum, sum hoyrir bøn og kemur til hjálpar og loysir fløkjur so snilt, at eingin kann fata tað!

*Effie Campbell* umsetti.

# Bíða í tolni

Gud bíðar eftir, at vit skulu blíva til reiðar til tað, hann ætlar sær at gera. Hann bíðar og bíðar eftir tær. Kanst tú bíða eftir honum? Mitt í øllum lyftunum til okkara, pínuni, óvissuni og ótolinum, skulu vit bíða og vera til reiðar.

Móses var ótolin. Hann orkaði ikki at bíða, til vatnið skuldi streyma úr klettinum bara eftir orði hansara. Hann slerdi tí á klettin, og hetta fekk avleiðingar fyri hann.

Sára og Ábraham orkaðu ikki at bíða eftir lovaða soninum. Tey blandaðu seg upp í Guds tíðarætlan, og Ábraham gjørdi trælkonuna við barn. Hetta broytti alla søguna.

Dugir tú at bíða í tolni eftir Harranum, til hann leggur seg út í lív títt? Renn ikki fram um Harran, men gakk aftan á honum.

*Aglowblaðið – Effie Campbell* umsetti.

# Eitt langt, lukkuligt hjúnalag

George og Mary Lou hátíðarhildu sítt gullbrúdleyp, og í tí sambandi spurdi ein blaðmaður George: „Hava tygum uppskriftina upp á eitt langt, lukkuligt hjúnalag?" George segði, at eftir brúdleypið hevði verfaðirin givið honum ein pakka. Í pakkanum var eitt gullur, sum George enn brúkti. Hann vísti blaðmanninum tað. Tvørtur um glasið á urinum, sum hann hugdi eftir mangar ferðir dagliga, vóru inngrivin hesi orð: „Sig okkurt pent við Mary Lou." Hasum urinum munnu vit øll hava brúk fyri.

*e.c.* ums.

---

Slagorðið hjá tí slóðbrótandi trúboðaranum William Carey var: „Vænta stór ting frá Gudi – Vága stór ting fyri Gud!"

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 31. mars | **Tekstur:** | **2. páskadagur,** Luk. 24,13–35 | **Bíbliuorð** | Luk. 24,34b |
| 7. apríl | **Tekstur:** | Dóm. 6,1–3+11–16+25–31 | **Bíbliuorð:** | Dóm. 6,16b ella 5 Mós. 31,8 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 8** ***14. apríl 2024*** **84. árg.**

# Hann læt meg í frelsubúna

**Hebr. 9,11–12:** „Men tá ið Kristus var komin sum høvuðsprestur fyri hinum komandi góðu lutunum, tá gekk hann inn ígjøgnum hina størru og fullkomnaru tjaldbúðina, sum ikki er gjørd við hondum, tað er: sum ikki er av hesum skapningi; og gekk ikki heldur við blóði av bukkum ella kálvum, men við sínum egna blóði eina ferð med alla inn í halgidómin og vann æviga loysn."

**Zak. 3,4–5:** „Tá tók eingilin til máls og mælti við teir, sum stóðu frammi fyri honum: „Latið hann úr hesum skitnu klæðunum!" Og hann segði við hann: „Sí, eg havi tikið misgerð tína av tær; lat teg nú í hátíðarklæði." Framvegis segði hann: „Setið á høvur hansara reint høvuðsskrúð."

**Jes. 61,10:** „Stórum eg gleðist í Harranum, um Gud mín fegnast mín sál, tí at hann hevur latið meg í frelsubúna, sveipað meg í rættlætis skikkju, eins og brúðgómur bindur sítt høvuðskreyt, eins og brúður letur seg í skart."

- - -

Tá ið vit hava bjóðað Jesusi inn í okkara hjarta sum Frelsara og Harra og givið honum lív okkara, so verða vit ikki syndafrí. Vit synda hvønn dag. Men tað er ikki soleiðis, at vit detta inn og út úr frelsuni aðruhvørja løtu. Frelsan er tryggari enn so.

Hvat hendir, tá ið vit verða frelst? Hann letur okkum úr okkara skitnu klæðum og letur okkum í hátíðarklæði. Hvørji eru hátíðarklæðini? Tey eru ein frelsubúni. Hann letur okkum í ein frelsukappa, sum er ein rættlætis skikkja. Vit eru latin í Jesusar rættvísi. Harafturat fáa vit reint høvuðsskrúð. Hvat er

nú tað? Tað er ein turban. Ein turban kemur niður á pannuna, og har koma tankarnir frá, so turbanin verjir okkara tankar, so teir ikki snúgva sær skeivar leiðir.

Alt hetta hevur Jesus givið okkum; men tað kostaði honum dýrt! Lat tað ikki vera til einkis, at hann doyði fyri teg. Bjóða honum inn í títt hjarta og takka honum fyri frelsuna.

*Effie Campbell.*

# Vandamikið at háða Gud

*Gordon Tobiassen*

Hoyr nú! Hesin undurfulli kapittulin hjá Jeremia (49,34–39) endar soleiðis: „Eg reisi hásæti mítt í Elam (t.e. Iran) og útruddi har bæði kong og høvdingar, sigur Harrin. Men á síðstu døgum, tá vendi eg lagnu Elams, sigur Harrin.“ Hetta er eitt lyfti til Iran.

Fyri tveimum árum síðani fordømdi og háðaði ovasti átrúnaðarligi leiðarin í Iran Ísraels Gud í iranska sjónvarpinum. Tað er vandamikið! Fimm dagar eftir sjónvarpssendingina sendi Gud glopraregn og áarføri yvir alt landið. Tað eru 26 landslutir í Iran, og vatnflóð rakti 23 teirra. Tá ið regnið rann burtur, flugu grashoppur í milliónatali úr Saudi–Arabia inn yvir Iran og ótu alla grøðina. Gud vísir, at Hann er Gud!

Fólkið í Iran er ørkymlað. Nógv rópa í dag á Jesus, og Hann vísir seg í dreymum og sjónum fyri teimum. Tey síðstu 10–14 árini hevur stór veking verið í Iran og Afganistan. Talan er um milliónir, sum hava vent um til Jesus.

Eg havi tosað við iranskar pastorar í Omdal, Oslo og Stavanger, sum greiða frá hesum. Men hetta tosa vesturlendsku fjølmiðlarnir ikki um.

Hvussu langt í tíðini eru vit komin? Fyri tveimum árum síðani var eg í Ísrael. Tá tosaði eg við verðsligar offiserar á Golan. Eg spurdi: „Hvat siga tit um tíðina, hvat liggur fyri framman?“ – Teir svaraðu: „Vit búgva út hermenn og savna herlið, tí vit vita, at okkurt liggur fyri framman.“ Eg setti messianskum offiserum og messianskum pastorum sama spurning. Teir svaraðu allir sum ein: „Les Ezekiel 39. Tað er tað, sum liggur fyri framman.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Samleiki – identitetur

Í verðini máta tey samleikan eftir t.d.: Hvussu vøkur ert tú? Hevur tú nakrar væleydnaðar sendingar í sjónvarpinum? Hvussu nógvar fylgjarar hevur tú á facebook? Hevur tú framgongd í lívinum og kanst vísa á góð úrslit?

Allar verðsins samleikar vara stutt – og teir geva eina falska trygd.

Okkara samleiki í Kristusi kann lýsast upp á fleiri mátar. **Her er ein teirra:** „Teimum, sum taka ímóti Jesusi, teimum, sum trúgva á navn hansara, teimum gevur hann rætt til at kalla seg Guds børn." Jóh. 1,12 N.S. Eg kann ikki koma í tankar um nakað, sum er ein større og tryggari samleiki enn at vera eitt Guds barn.

**Her er eitt annað skriftstað:** 2. Kor. 5,17: „Tí, um onkur er í Kristi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!"

Eg kann ikki koma í tankar um nakran sterkari samleika enn at vera ein nýggjur skapningur í Kristusi.

Okkara samleiki kann ikki broytast ella minka í virði og versna. Tí hann er í Kristusi – og hann er tað hægsta, sum fæst. Hann er ein gáva frá Gudi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Harrin hevur lækkað aldurin tvær ferðir

Frá Ádami til Enok eru sjey ættarlið. Enok var sjeyndi maður frá Ádami. Sjey er heilaga talið, tað er Guds tal. Hvat serligt var við Enoki? Hann gekk við Gudi, og Gud tók hann burtur. (1. Mós. 5,21–24). Hann er ein fyrimynd upp á meinigheitina. Gud fer einaferð at taka tey, sum ganga við Gudi og hava Jesus í hjartanum, heim til sín.

Enok fekk ein son, sum kallaðist Metusalem. Hann bleiv 969 ára gamal og er elsta fólk, ið hevur livað. Men eftir at Nóa kom út aftur úr ørkini, sá Gud, at tað var ikki gott, at menniskjuni blivu so gomul. So fyrru ferðina, at Harrin lækkaði aldurin, er her: „Tá segði Harrin: „Andi mín skal ikki allar ævir búgva í menniskjuni, tí at hon er jú hold; og ævidagar hennara skulu vera eitt hundrað og tjúgu ár (120 ár)." (1. Mós. 6,3).

Dávid kongur bleiv sjálvur 70 ár (2. Sám. 5,4), og hann sigur í Sálmi 90,10: „Sjúti (70) ár er æviskeið várt, og um mikil er megin áttati (80) ár, og teirra dýrd er bert sút og møði, tí tíðin rennur, og vit flúgva avstað.“ Hetta er seinnu ferð, at aldurin verður lækkaður.

So er umráðandi at gera eftir hesum ráðunum: „At telja várar dagar tú okkum læri, at vit mega vísdóm í hjartanum fáa! (Sálm. 90,12).

*Effie Campbell* umsetti.

# Ikki í nervalagnum

Ísraelsmenn høvdu fingið boð um at smyrja blóð av lambi upp á duratræið og durastavirnar, so skuldi deyðseingilin ganga fram við teimum og spara tey. Summi av húsfólkunum vóru kanska djørv, meðan onnur kanska vóru óttafull og ivaðust í, um hetta nú mundi fara at ganga. Hvør teirra var nú tryggari, tey djørvu ella tey bangnu? Báðir partar vóru líka tryggir, tí tryggleikin sat ikki í nervalagnum, men í blóðinum.

Eisini høvdu tey fingið boð um at eta alt kjøtið á lambinum. Einki mátti vera eftir. Hví? So at tey høvdu kraft og styrki at koma sær út úr Egyptalandi. Blóðið vardi móti dóminum, kjøtið gav megi at koma sær út úr trælalandinum, sum er ein mynd upp á hesa verð, alt tað verðsliga.

Vit eiga eisini somu rættindi sum ísraelsmenn. Vit mugu ákalla Jesu blóð hvønn dag at verja okkum, og vit mugu fylla okkum við Bíbliunnar orðum, so vit hava kraft og styrki at koma sigrandi gjøgnum hesa verð.

*Effie Campbell* umsetti.

---

At Jesus reis upp er ein vitnisburður um, at Gud góðtók tað ofrið, sum Jesus gav.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 14. apríl | **Tekstur:** | Dóm. 7,1–4+9–21 | **Bíbliuorð:** | Jes. 41,10 |
| 21. apríl | **Tekstur:** | Rut, 1,1–5+16; 2,11–12 ;4,9 | **Bíbliuorð:** | Jes. 49,15d–16a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74